Stjørnan-Tjaldur 33-13(14-7)

# Stórsigur til Stjørnuna

**Stjørnan gjørdi bart, tá ið Tjaldur vitjaði í KÍ-høllini sunnukvøldið. Oddaliðið vann stórt, og um tær vildu, kundu tær vunnið við enn fleiri málum.**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


*Bára Skaale Klakstein og Stjørnan vunnu ein tryggan sigur á Tjaldur sunnukvøldið*
*savnsmynd*

Tað var eingin slingur í valsinum, tá ið oddaliðið í Sunset-kappingini Stjørnan hevði vitjan av Tjaldur úr Runavík seint sunnudagin í Klaksvík. Heimaliðið lat ongan iva verða um, at tær ætlaðu sær at avgerða dystin beinan vegin, og longu tá ið tíggju minuttur vóru leiktir, hevði Stjørnan eisini lagt seg á odda 7-0!

### Louisa í hopla

Tað var næstan so, at Stjørnan skoraði eftir vild, men hesaferð vóru tað tó eisini onkur av teimum meira anonymu leikarunum í hópinum hjá Stjørnuni, sum hildu seg framat. Eitt nú Louisa Andreeasen, sum saman við Katarinu Stjepanov gjørdist toppskjútti hjá heimaliðnum við níggju málum.

Eftir at heimaliðið hevði lagt seg avgerandi á odda, tóku tær sær av løttum eina løtu, soleiðis at gestirnir fingu fóta sær eitt sindur, men tað var bert eina løtu, so setti heimaliðið ferð á aftur.

Eftir steðgin hevði Stjørnan fulla ferð á, og málini skolaðu inn aftan fyri neyðars Lone Bajer í málinum hjá Tjaldur. Ikki færri enn 19 ferðir sat bóltúrin í netinum hjá Tjaldur eftir steðginum, samstundis sum runavíkskvinnur sjálvar bert fingu skoraði seks ferðir í hinum endanum.

Um talan var um eina lætta uppgávu hjá Stjørnuni sunnudagin, so verður tað øðrvísi í morgin, tá ið tær skulu spæla fyrru hálvfinaluna í Coca-Cola kappini móti nærmastu kappingarneytunum úr VB.

**Stjørnan-Tjaldur 33-13 (14-7)**
Stjørnan: Katarina Stjepanov 9 (4), Louisa Andreasen 9 (1) Joan M. Djordevic 4, Una Olsen 3, Bára Skaale Klakstein 3, Beinta Joensen 3, Anna Kristina Samson 2.
Tjaldur: Heidi Heinesen 4, Anna Hansen 3, Heidi Sevdal 2, Anni Højgaard 1, Kirstin Jacobsen 1, Hanna Isaksen 1, Jacoba Langgaard 1.
Brotskøst: Stjørnan 7/5, Tjaldur 0
Útvísingar: Stjørnan 0 , Tjaldur 4
Dómarar: Pole Hansen og Hartvig Joensen.

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**
MENN

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 329 | 289 | 40 | 10 |
| 2 | Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 331 | 264 | 67 | 8 |
| 3 | KÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 275 | 301 | -26 | 6 |
| 4 | H71 | 1 | 0 - 0 - 1 | 327 | 327 | 0 | 5 |
| 5 | StÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 293 | 326 | -33 | 5 |
| 6 | Neistin | 1 | 0 - 0 - 1 | 298 | 346 | -48 | 3 |
| 7 | Tjaldur | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |

**SUNSET KAPPINGIN**
KVINNUR

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 11 | 11 - 0 - 0 | 300 | 211 | 89 | 22 |
| 2 | VB | 11 | 10 - 0 - 1 | 347 | 210 | 137 | 20 |
| 3 | Neistin | 12 | 9 - 0 - 3 | 354 | 253 | 101 | 18 |
| 4 | Søljan | 12 | 7 - 0 - 5 | 335 | 281 | 54 | 14 |
| 5 | VÍF | 12 | 5 - 0 - 7 | 286 | 271 | 15 | 10 |
| 6 | StÍF | 11 | 2 - 1 - 8 | 233 | 299 | -66 | 5 |
| 7 | Kyndil | 12 | 1 - 1 - 10 | 217 | 345 | -128 | 3 |
| 8 | Tjaldur | 11 | 0 - 0 - 11 | 190 | 392 | -202 | 0 |



# Nú slapp Claus upp í part

**Føroyski landsliðsspælarin var á vøllinum síðsta lítla korterið, tá ið Coventry leygardagin spældi seg í fjórða umfarið í FA Cup**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Leygardagin segði Claus Bech Jørgensen her á síðunum, at hann er troyttur av Coventry, og at hann hevur gjørt upp við seg sjálvan, at hann nú skal flyta til annað felag. Tess skjótari tað verður, tess betri verður tað.

Orsøkin til niðurstøðuna og ætlanina er, at føroyski landsliðsspælarin síðani skaðan í landsdystinum á Kypros í oktober ikki hevur verið á besta liðnum hjá Coventry. Hann heldur seg ikki hava fingið møguleikan, sum hann sjálvur heldur, at hann átti at havt fingið.

Men leygardagin fekk Claus fyrsta møguleikan síðani í oktober. Um hetta fer at vera við til at broyta áskoðanina, so Claus verður sinnaður at halda fram í Coventry, sigur henda søgan einki um, og tað valdast ivaleyst um so nógv.

Nýggi venjarin í Coventry, Adrian Heath, hevði tríggjar nýggjar millum teir fyrstu ellivu, tá ið Coventry í triðja umfarinum í stóru steypakappingini hevði vitjan av Crewe, sum Coventry fyrr í hesum kappingarárinum hevur tapt fyri á heimavølli. Claus Bech Jørgensen var á beinkinum, og í 78. minutti varð hann saman við einum øðrum skiftur inn. Fyrsta skiftingin varð framd í steðginum.

Tá ið Claus kom á vøllin, var støðan 3-0, eftir at tað í steðginum hevði staðið 2-0. Síðstu løtuna trýsti Coventry fyri at økja um leiðsluna. Tað eydnaðist ikki, men teir í Coventry vóru ovurfegnir um úrslitið.

### Vónar at halda fram

Hósdagin í síðstu viku fór Coventry venjarin, Peter Reid, úr starvinum. Hjálparvenjarin hjá honum, Adrian Heath, er fyribilssettur venjari. Eftir góða úrslitið leygardagin, sigur hann seg vóna, at nevndin í felagnum fer at vísa honum álit og harvið at seta hann í fast venjarastarv. Enn hevur nevndin einki sagt um hetta.

Tað var fyribilssetti venjarin, sum leygardagin vísti Claus Bech Jørgensen størri álit, enn fráfarni venjarin nakrantíð hevur gjørt, síðani Claus kom fyri seg eftir brotna rivjabeinið á Kypros. Í vikuskiftinum verður avbjóðingin hjá Coventry stór. Tá skulu teir í landskappingini spæla á útivølli ímóti Ipswich, sum er topplið í næstbestu deildini. Spurningurin er, hvør tá fer at vera venjari, og um venjarin, sum tá verður, aftur fer at vísa Claus Bech Jørgensen álit.